Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Bráðfeingis sálarhjálp

Spurningar:

1. Er landsstýrismaðurin vitandi um, at persónar, sum venda sær til heilsuverkið við bráðfeingistørvi á sálarhjálp, verða heimsendir uttan at røttu fakfólkini gera meting av viðkomandi?
2. Hvønn rætt hava persónar við bráðfeingistørvi á sálarhjálp at fáa eina meting frá vakthavandi lækna á psykiatriska deplinum?
3. Nær verður ein skipað sálarfrøðilig skaðastova klár?

Viðmerkingar:
Javnan hoyrast neyðarróp frá avvarðandi hjá psykiatriskum sjúklingum, at sjúklingar ikki fáa bráðfeingis sálarhjálp. Fólk, sum møta upp á skaðastovuni við átrokandi tørvi á hjálp, verða vend í hurðini við grundgevingini, at psykiatriski depilin ikki tekur fólk inn.

Sama ger seg galdandi, tá sjúklingar seta seg í samband við egnan lækna í dagtímunum.

Í fleiri ár hevur politiski myndugleikin arbeitt við eini sálarfrøðiligari skaðastovu. Breið politisk semja tykist at vera um at raðfesta hetta arbeiðið. Kortini má ásannast, at neyðugt er at skipa móttøkuna betur fram til, at arbeiðið er komið á mál.

Sum eitt minsta krav eiga psykiatriskir sjúklingar at fáa eina meting frá vakthavandi lækna á psykiatriska deplinum, áðrenn tey verða send heim.

Á Løgtingi, 22. apríl 2022

Eyðgunn Samuelsen